Upplestur og tónleikur í Miðlahúsinum:

# Oddfríður, Finnur, Bárður og Heðin






TÍÐINDASKRIV

Fríggjakvøldið klokkan 21:00 verður upplestur og tónleikur í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Teir, ið fara at lesa upp eru: Oddfríður Marni Rasmussen, Bárður Persson og Heðin M. Klein. Tónleikin, sum verður spældur, hevur Finnur Jensen gjørt.

Heðin M. Klein er gamal í garði, og hevur latið úr hondum fleiri yrkingasøvn. Í seinasta yrkingasavni hansara "Móti tøgnini" sóu vit, hvussu væl úr hondum greiddur týðari hann eisini er. Har eru fleiri týðingar við, sum norska stórskaldið Olav H. Hauge hevur skrivað. Heðin M. Klein hevur í sínum yrkingum ein sermerktan og góðan málbúnað, og sum upplesari er hann fangandi.

Oddfríður Marni Rasmussen hevur skrivað sjey yrkingasøvn, men nú eru tvey ár síðani seinasta bókin "Gráir týdningar" varð latin lesarum. Eitt nýtt yrkingasavn kemur í heyst, og hann fer at lesa upp úr tí.

Bárð Persson kenna flest øll sum ein góðan sjónleikara. Hvør minnist ikki leiklut hansara í "Elling og Kjell Bjarne". Bárður Persson hevur ikki givið út bók, men yrkingar hansara hava staðið í tíðarritinum "Brá". Tær hava eisini verið lisnar upp í Útvarpi Føroya og í øðrum høpi. At Bárður Persson er sjónleikari skuldi boða frá góðum upplestri, tí at teirra endamál er jú at bera boðskapin út so klárt, sum til ber.

Finn Jensen kenna tey flestu sum sangara, lagasmið, sjónleikara og sum ein av høvuðsmonnunum í bólkinum Páll Finnur Páll. Sangurin "Forelskaður sjónleikari" er vorðin ein sonn landaplága, og lógu teir á einum fyrsta plássi á fimtan teimum bestu í fleiri vikur. Hann fer at framføra nýggjari og eldri løg.

# Til Dímunar við báti

*Tíðindaskriv*

At vitja uppi á Stóru Dímun er forkunnugt í sær sjálvum. Men at fara við báti, ganga eftir helluni og upp gjøgnum Kleivina, tað ber bert til fáar ferðir um árið.

Um vikuskiftið fer Hvíthamar, seksæringurin hjá Jóan Peturi Clementsen á Sandi, ein túr til Dímunar. Um tað verður leygardagin ella sunnudagin, verður avgjørt fríggjadagin. Onkuntíð fyrr er komið fyri, at tað ikki hevur viðrað ásetta dagin - men dagin eftir. Hesaferð vil Jóan Petur tí vera fyrivarin.

Uppi á Dímun er Óla Jákup úr Dímun klárur at vísa oynna fram.

Tólv fólk sleppa við, og tí má meldast til. Hetta verður gjørt á Sandoyar Kunningarstovu, har eisini fleiri upplýsingar um túrin fáast.

Saybia, sum spældu á MjúS herfyri, vóru og vitjaðu á Dímun. Og komu heimaftur við einum friðsælum smíli. "Eitt av vakrastu støðum, vit hava verið", var afturmeldingin. Hvíthamar gevur nú føroyingum kjansin at fáa somu uppliving, - og sama smíl!


